Røða til aðalfundin hjá Pedagogfelagnum
Hotel Føroyar
Leygardagin 5. apríl kl. 13.30

**Týdningin av pedagogiska amboðnum í menningin og trivnaðinum hjá borgaranum frá vøggu í grøv**

Eg fari fyrst av øllum at takka fyri, at eg var boðin her í dag at greiða frá, um støðuna á sosialpedagogiska økinum innan almannaøkið og hvørjar ætlanir arbeitt verður við.

*

Vit eru øll samd um at málið er at verja okkara børn og ungu og syrgja fyri, at tey fáa ein tryggan og góðan uppvøkstur í Føroyum.

Vit ynskja øll at kunna veita nøktandi tilboð í Føroyum soleiðis, at tey, sum hava tørv á hjálp, fáa hjálpina her heima.

Týdningurin av at seta inn tíðliga og við rættari hjálp skal ikki undirmetast. Ein torfør byrjan kann verða meira enn trupul at sleppa av aftur við

> "Eg eri heilt sannførd um, at eg hevði ikki sitið her í dag – í einum stjórastóli. Eg hevði sitið á einum barrstóli, um ikki nøkur menniskju rættu mær eina hjálpandi hond," *citat: Lisbeth Zornig Andersen.*

Skal tað verða møguligt at seta inn so tíðliga sum gjørligt, er alneyðugt, at fakfólk fráboða barnaverndartænastuni so tíðliga sum gjørligt. Tí er tað av alstórum týdningi, at tey fakfólk, sum eru um børnini í gerandisdegnum, eitt nú pedagogar og lærarar, longu undir útbúgvingini fáa neyðugar førleikar at síggja vandatekin og taka hesi í álvara.

Lógin um barnavernd, sum var endurskoðað í 2012, hevði m.a. við sær at barnaverndarøkini nú eru skipað í størri eindir. Barnaverndarmál eru sera viðkvom og trupul at umsita. Við størri eindum verður fakligi førleikin styrktur, umframt at trygdin hjá tí einstaka gerst munandi betri.

Aðalmálið í barnaverndarlógini er at verja barnið og at styrkja rættartrygdina hjá bæði børnum og foreldrum. Við broytingunum í 2012 er fráboðanarskyldan hjá bæði myndugleikum og vanligum borgarum herd, eins og fakligu krøvini hjá starvsfólkum í barnaverndarumsitingini verða skerpað.

*

Í ár fyllir ST Barnarættindasáttmálin 25 ár, og hóast og tíbetur allar flestu børn í Føroyum vaksa upp í góðum og tryggum heimum, so er eisini í Føroyum, hesum lítla, vakra og friðarliga paradís á jørð, døkkir blettir at hóma:

> "Tá eg hugsi um barnadagar mínar
> Er tað ræðumyndir ið eg minnist best
> Tær løtur eg var bukaður og bangin
> Í huga mínum mangt seg hevur fest
> Tí sum barn tú vilt taka fyri givið
> At í kærleika skapast tín verð
> Men tann dagin, tú skalt stíga út í lívið
> Ert tú sum eitt friðleyst dýr á tíni ferð"

Soleiðis yrkti svenski Bjørn Afzelius í 1984, ein sangur sum bleiv ein landaplága í øllum norðurlendsku londunum, og sum Steintór Rasmussen umsetti til føroyskt. Og hóast sangurin hevur verður sungin til mangt veitslulag, so er álvarin, sum Bjørn Afzelius tekur fram, ikki til at taka feil av.

Børn hava rætt til at vaksa upp í einum tryggum og kærleiksfullum heimi. Tað er eisini útgangsstøði í ST Barnarættindasáttmálanum. Og hóast at Føroyar ikki livi upp til allar ásetingarnar í sáttmálanum enn, so verður javnt og samt arbeitt við at tryggja børnunum teirra rættindi.

*

Við broytingunum í barnaverndarlógin, eru nú greiðar ásetingar um, hvør ábyrgd áliggur okkum, bæði í gjøgnum okkara arbeiðið – starvsfólk á barnaansingarøkinum, skúlum, heilsusystrar, kommunlæknar o.o. – men eisini sum privat persónar, tá vit gera varug við, at eitt barn livir undir viðurskiftum, ið kunnu skaða tess sálarligu ella likamligu heilsu og menning.

Hevur tú sum starvsfólk orsøk til at halda – t.v.s. hevur illgruna um – at tað eru viðurskifti, sum ikki eru sum tey skulu verða – hevur tú skyldug til at fráboðað barnaverndartænastuna um hetta. Gerst tú ikki tað, kanst tú verða revsaður við bót ella hefti.

Sum privatpersónur – tað kann verða familjulimir ella grannar – hevur tú skyldug at fráboða um tú hevur kunnleika til at eitt barn livir undir viðurskiftum, ið kunnu skaða tess sálarligu ella likamligu heilsu og menning.

Lóggávan er sostatt ógvuliga greið, og endamálið er sjálvsagt at steðga skaðiligu ávirkanina, eitt nú tað hevur at liva í einum heimi, har rúsevnismisnýtsla gongur útyvir vælferðina hjá barninum.

Tá tað er staðfest, at eitt barn ella ein familja hava tørv á hjálp, er tað at stórum týdningi, at rætta hjálpin verður sett í verk beinanveg. Tí er alneyðugt, at børnini verða útgreinað innan rímiliga tíð, so staðfestast kann, hvør rætta hjálpin er. Tað tekur alt ov langa tíð at fáa børn útgreinað. Tískil er neyðugt, at hetta verður raðfest av avvarðandi myndugleikum.

*

**Barnahús**

Beint fyri jól í fjør lat fyrsta Barnahúsið upp í Føroyum. Barnahúsið skal virka sum karmur um tvørfakligt og samskipað samstarv millum barnaverndartænastur, løgreglu og heilsumyndugleikar í málum um kynsligan ágang og annan harðskap.

Barnahús er skipan, sum er kend í londunum kring okkum. Í 1998 lat Barnahús upp í Reykjavík. Hetta er skipað eftir amerikonskum leisti, har tey hava havt sokallað Children's Advocacy Centers síðani 1985. Íslendska Barnahúsið er víðagitið og fyrimynd hjá nógvum londum í Evropa. Í Danmark lótu fimm Barnahús upp 1. oktober í fjør.

Endamálið við Barnahúsinum er, at børnini skulu fáa eitt gott heildartilboð um hjálp og viðgerð *á einum og sama stað*.

Talan er um eitt trygt stað, har børnini kenna seg væl at koma, og har avvarðandi myndugleikar so koma til barnið í staðin fyri, at barnið skal ferðast runt til ymiskar myndugleikar.

Barnahúsið skal tryggja, at førleikarnir at taka sær av kynsligum ágangi og øðrum harðskapi móti børnum, eru savnaðir á einum stað.

Formliga er Barnahúsið skipað við avtalu millum Almannamálaráðið, Heilsumálaráðið, Føroya Landfúta og Kommunufelagið, sum varðar av Barnaverndarstovuni. Virksemið inni í Barnahúsinum verður skipað við avtalu millum Barnaverndarstovuna, Landssjúkrahúsið og Føroya Landfúta, og tað er Barnaverndarstovan, sum umsitur og rekur Barnahúsið.

Virksemið í Barnahúsinum fevnir um at kanna, um barnið hevur verið fyri kynsligum ágangi ella øðrum harðskapi, videoavhoyringar hjá løgregluni og at veita barninum og familjuni kreppuhjálp og ráðgeving. Harumframt verða neyðugar læknakanningar samskipaðar í Barnahúsinum.

Eftir at Barnahúsið varð skipað, hevur nógv virksemi verið í húsinum. Nógv virksemið hevur verið við at fáa samskipanina millum myndugleikarnar at virka væl og smidligt. Men eisini nógv nýggj mál eru viðgjørd í Barnahúsinum. Royndirnar frá okkara grannalondum eru, at eftir at Barnahús er skipað, økist talið av fráboðanum. Og hesa gongd síggja vit nú eisini í Føroyum.

*

“Standa vaksin har og peika tær á vegin
Hava meiningar og vilja seta mið
Allir dreymarnir og teirra brostnu vónir
Skulu fremjast í tær og fylgja við
Ert tú lýðin fært tú rós og allan heiður
Í uppreistri missur tú alt
Eingin elskar eitt barn sum ikki eydnast
Eingin elskar eitt barn sum er frælst”

*

Tað hevur týdning at fáa greiðari viðurskifti og betri samskipan á barnaverdarøkinum. Eg haldi sjálv, at vit eru væl ávegis við bú- og viðgerðarstovnar hjá landinum og Barnaheimið.

Umskipanin hevur gjørt tað møguligt at menna og tillagað tilboðini til veruliga tørvin, sum er á økinum. Skal samskipanin gerast betri, er næsta stigið at fáa fosturforeldraskipanina inn undir sama hatt.

Sjálv haldi eg, at tað er altumráðandi, at vit nú geva okkum rúm og tíð til at arbeiða við eini langttíðar loysn. Hetta merkir ítøkiliga, at vit seta eitt tvørfakligt toymi í fast starv, sum fær møguleika fyri at gera eina skipan við støði úr teirri vitan, sum er framleidd í grannalondum, og teim royndum, sum vit í Føroyum hava á økinum. Vit hava nógv dugnalig starvsfólk, og eg havi fult álit á, at hetta kann lata seg gera.

Eg haldi, at eg, uttan fyrilit, kann siga, at øll eru samd um, at børnini og familjurnar hava tørv á heildartilboði. Tað er sostatt ikki nokk, at Almannamálaráðið skipar sosialpedagogiskar samdøgursstovnar, um ikki Mentamálaráðið skipar nøktandi skúlatilboð og Heilsumálaráðið skipar nøktandi psykiatrisk tilboð og tilboð um samdøgursviðgerð av rúsevnismisnýtslu. Øll tilboðini mugu vera til staðar samstundis.

Í hesum sambandi kann eg tó vísa á, at tað eru tiltøk sett í verk til at bøta um hetta. Í fjør lat bú og virknistilboð til menningartarna og ung við autismu upp á Børkugøtu í Havn, har pláss er fyri 12 fólkum. Eisini verður arbeitt við at menna tilboð til ung sálarsjúk í Havn.

*

Í sambandi við "Heildarætlanina um Fólkafráflyting og fólkavøkstur", sum var handað landsstýrinum í 2013, her eitt av átøkunum "At betra um umstøðurnar fyri familjur við børnum, ið bera brek".

Umstøðurnar hjá familjum, sum hava børn við serligum tørvi, eru tíverri ikki serliga góðar í Føroyum. Familjur sum hava børn við serligum tørvi, kenna at tilboðini og heimildarfólkini eru spjadd millum fleiri myndugleikar. Avleiðingin av hesum hevur í fleiri førum verið at heilar familjur flyta av landinum av hesi orsøk.

Trupulleikarnir eru ikki neyðturviliga at tilboðini ikki eru í Føroyum, men heldur at tilboðini ikki eru samskipað, og tað er trupult hjá foreldrunum at finna runt í skipanunum.

Tí gjørdu Almannamálaráðið, Mentamálaráðið og Heilsumálaráðið av, at ítøkiligar loysnir skulu finnast, og at hesar skulu finnast við støði í børnunum og familjunum, sum hava ein ávísan tørv.

Ein embætismannabólkur við umboðum úr hesum trimum myndugleikum, varð sett at skipa hetta arbeiðið, og er ein verkætlanin í gongd, sum ber heiti "Tann góða tilgongdin." Endamálið er at finna ein ítøkiligan leist til at samskipa verandi tilboð og fyriskipanir við tí fyri eyga at veita eina samanhangandi heildartænastu. Sum eina roynd verður í fyrstu atløgu tikið støði í royndum hjá familjum, ið hava børn, sum hava sjúkueyðkennini autismu

Semja er um:

- at tørvur er á formligum samstarvi millum ymisku stovnarnir, sum veita tilboð til børnini/familjurnar
- at tørvur er á at hava brúkaran í miðdeplinum, tá ið loysnir skulu finnast
- at tørvur er á at hava fakfólk á økinum við, tá ið loysnir skulu finnast
- at tørvur er á at hava familjurnar við, tá ið loysnir skulu finnast

Í løtuni verður kanningararbeiðið gjørt, sum tekur støði í royndunum hjá børnunum og familjunum, og arbeiðsbólkar fylgja gongdina: frá eygleiðing til sjúkuavgerð, frá sjúkuavgerð til tænastu og endaliga samskipan av tænastum.

Royndarverkætlanin skal verða liðug í 2014. Úrslitið av átakinum skal eisini kunna brúkast á øðrum økjum enn í sambandi við autismu.

Nýggja Reiðri í Runavík fyri heimabúgvandi fjølbrekað letur upp í august, og við hesum verður eitt nýtt og stásiligt tilboð til hesi børn og ung, sum hava tørv á koma á eitt dagtilhald ella til umlætting.

Tað er umráðandi at vit skapa og skipa tilboð, soleiðis at hesi og familjur teirra støðast og trívast í Føroyum, og tað gera vit best um tey mennast.

*

**Endurskoða serforsorgina**

Eitt annað økið, sum stendur fyri framman at endurskoða og fremja nýskipanir er serforsorgin. Eitt nú eru galdandi reglur ótíðarhóskandi, m.a. tá hugsað verður um námsfrøðiliga partin. Ongar ásetingar eru um námsfrøðiligt eftirlit, men nú verður ítøkiliga arbeitt við at skipa hetta. Almannaverkið er farið undir samstarv við Tilsyn Midt í Danmark, og er ætlanin at námfakligt eftirlit verður framt á øllum sambýlum og stovunum í ár. Her kundi eg m.a. hugsað mær at ein námsfrøðiliga heildarætlan verður gjørd fyri hvønn einstaka, soleiðis at til ber at fylgja við í námsfrøðiligu menningini.

Í hesum sambandi havi eg í vikuni og í síðsta mánað vitja átta sambýli á Trvinaðarøkinum í Havn. Og tað var sera gott hjá mær sum landsstýriskvinnu at uppliva, at starvsfólkini eru dugnalig og umsorganarfull, og at tey ganga høgt uppí sítt starv. Tað er vist at starvsfólkini eiga sín stóra lut í, at sambýlini eru heimlig og hugnalig hjá búfólkunum at búgva í, og tað eri eg ógvuliga takksom fyri og errin av.

*

“Men hvør megnar av røttum at vita
Hvat rúmast - hvat skapast vit til
Hvør kann beina ein fram til eitt eydnuríkt lív
Hvat menniskja evnar og vil”

Vit hava higartil mest sett námsfrøðiliga arbeiðið í samband við arbeiðið við børnum og fólki við menningartarni. Men eg haldi, at eisini á øðrum økjum eru fleiri fyrimunir at inkludera námsfrøðiliga partin í størri mun, enn higartil hevur verið gjørt. Eg haldi, at tað er umráðandi at hugsað breiðari, og síggja týdningin av pedagogiska amboðnum í menningin og trivnaðinum hjá borgaranum frá vøggu í grøv.

Eitt øki, sum vit í Føroyum ikki hava verið so von at síggja námsfrøðina í eldrarøktini. Hetta hava nakrar kommunur í Danmark seinastu árini havt góðar royndir við. Eldrarøktin hevur brúk fyri teimum dygdum, sum námsfrøðingar hava. Námsfrøðingarnir arbeiða námsfrøðiligt við teimum eldri: gera aktivitetir við tey, tosa við tey, lurta eftir teimum, og eisini fáa tey tey eldru at taka lut í virkseminum á heimum, m.a. við at hjálpa til at borðreiða o.a. sum tey megna. Hetta hevur givið fleiri lívsmótið aftur, og givið teimum kvalitet í gerandisdagin. Tað snýr seg um at síggja menniskja handan rukkurnar.

Tað hava sjálvsagt verið avbjóðingar – so er ofta, tá mann ger broytingar og hugsar nýtt. Men eg haldi at við góðum dialogi, og vilja og forstáilsi partarnar ímillum, eru vinningarnar størri, enn tað missurin. Og tá standa allir partar eftir sum vinnarar.

Avbjóðingarnar hava m.a. verið at røktarfólki halda at pedagogarnir gera alt tað stuttliga saman við teimum eldru, meðan røktarstarvfólkini skuldu gera alt tað praktiska – eitt nú vaksa, mata og røkta tey gomlu.

Men tað sum tað snýr seg um, er at seta sjóneykuna á, hvat ber til, heldur enn, hvat ikki ber til, at síggja heilsuna, heldur enn einans sjúkuna.

Royndirnar í Danmark vísa at mann hevur flutt seg frá røktarheimstankanum til umhvørvi sum setur fokus á gerandisdagin hjá teimum gomlu. Higartil hevur sjúkrarøkt og reingerð hevur fylt alt ov nógv hjá starvsfólkunum í teirra samveru við teimum gomlu. Nógv tíð brúkt til praktiskar

uppgávur, vaksa, røkt, geva mat – og hetta er ikki tað, sum hevur størsta týdning í gerandisdegnum hjá vanligum fólkum.

Tað hevur verið torført at fáa røktarstarvsfólk at skilja, hvat meint var við, tá tosað um meira lív í eldrarøktina. Neyðugt hevur verið at venda øllum á høvdið, og fáa pedagogar inn við øðrum brillum, sum síggja menniskju frá øðrum sjónarhorni. Sum hevur við samveru og relatiónir at gera. Tað er ein fakkompetansa hjá námsfrøðingum, sum eg haldi at tit eiga at brúka – eisini í eldrarøktini.

Eldri er eins ymisk og onnur fólk. Við at seta fokus á tað sosiala lív og styrkirnar hjá tí einstaka, kunnu røktarstarvsfólk verða partur av námsfrøðiligu relatióninar, og við hesum stuðla undir at tey eldur fáa møguleika at liva lívið fult út.

**Barnaumboðsmann**

Eftir at Føroyar hevði verið til próvtøku í ST barnarættindasáttmálanum í 2010 var eitt av kritikkpunktunum, at vit í Føroyum ikki hava ein barnaumboðsmann. Hetta er eitt mál, sum eg alt fyri eitt setti á dagskrá, tá eg bleiv landsstýriskvinna.

Eg vendi mær til Formansskapin í Løgtinginum við ynski um, at umboðsmaðurin fær uppgávuna at virka sum óheft eftirlit á barna- og ungdómsøkinum. Lógaruppskotið varð samtykt fyri jól í 2013, og peningur er settur av til endamálið. Løgtingsins umboðsmaður ger nú neyðugar fyrireikingar, og eftir ætlan fer Løgtingsins umboðsmaður eisini at virka sum Barnaumboðsmaður 1. oktober í ár.

Í umboðsmanslógini er nú beinleiðis ásett, at Løgtingsins umboðsmaður skal tryggja og hava eftirlit við implementeringini av ST-Barnasáttmálanum, herundir rættindum hjá børnum, sum eru ásett í føroyskari lóggávu til tess at lúka skyldurnar hjá Føroyum sambært sáttmálanum.

Ítøkiliga verður hetta framt við, at umboðsmaðurin viðger klagur um viðurskifti hjá børnum, tekur mál upp av egnum ávum, fer á eftirlitsvitjanir á stovnum v.m., har børn eru, og við at gera Løgting og landsstýri varug við, um lógir og fyrisitingarligar ásetingar ikki eru. Við lógarbroytingini eru heimildirnar víðkaðar til at fevna um privatar stovnar o.a., hvørs uppgávur beinleiðis viðvíkja børnum.

*

Eg fari at takka fyri, at tit lýddu á. Hetta var eitt ógvuliga breitt upplegg, har eg kom inn á nógv ymisk mál, men sum øll hava røtur á Almannamálum og fevna frá tilboðum frá vøggu í grøv. Eg fari at enda við seinasta ørindunum úr Ikaros, hjá Bjørn Afzelius, og við hesum ynskja tykkum framhaldandi ein góðan aðalfund.

> "Lat tínar blómur festa rót í góðum lendi
> Og lat plantur tínar grógva vilt og vítt
> Í vakstrarhúsi saknast sól og vindur
> Í náttúruni tær kunnu vaksa frítt
> Tey tú elskar skulu royna sínar veingir
> So tey einaferð finna sítt flog
> Sum tú virðir tíni egnu tú vilt sanna
> At tey eisini vilja virða teg so"